


# Søgulig farleið – nú sum flogleið

Mongum føroyingi hevur longst eftir at vitja Bergen, síðani tey mistu møguleikan sjóvegis. Nú býðst høvið at vitja vakra vesturnorska býin, aftaná ein bert 5 korters langan flúgvitúr

Meðan føroyingar kanska kunnu verða ósamdir um, hvørt vit skulu nevna býin Bergen ella Bjørgvin, so nýtast vit ikki at verða ósamd um, at náttúruliga, umhvørvisliga og mentanarliga,er største býurin á norska vesturlandinum ein sonn perla. Mongum føroyingi hevur longst eftir at vitja vakra býin, sum vit hava søgulig og mentanarlig sambond við.

## "Bryggen"

Nevnir ein Bergen, so má ein eisini nevna "Bryggen" – ta gomlu bryggjuna í Bergen. Bryggen er nevnd at verða ein heimsarvsstaður fyri sítt søguliga virðið. Gomlu, litríku træbygningarnir eru einastandandi vakrir og hugnaligir. Tað ber til at spáka millum gomlu træbygningarnir eftir trongum farleiðum. At gera hendan túrin, kennist sum at fara nøkur hundrað ár aftur í tíðina. Á Bryggen eru bæði handlar, gallarí, søvn, matstovur, umframt serstøk handilsstøð, sum selja serligar lutir til ferðafólk.



## "Bergenhus fæstning" og "Fløien"

Skamt frá Bryggen liggur aldargamli skansin "Bergenhus fæstning". Fyrsti partur av Bergenhus fæstning stavar frá ellintu øld. Staðið verður mett at verða tað best varðveitta staðið, tá talan er um norska miðaldarsøgu. Eitt sum eisini eigur at verða roynt í Bergen, er ein túrur við "Fløibanen". Talan er um eina serliga farleið við lyftu, sum førir teg til eitt framúr gott útsýnispláss, sum liggur á 300 metra hædd. Stutt er millum túrarnar, so ongum nýtist at bíða leingi, fyri at sleppa niðan á útsýnisplássið, har til ber at skoða eitt sjáldsama vakurt útsýnið yvir allan býin.

"Nordens kvarter" og náttúran

Ein annar framúr hugnaligur býarpartur í Bergen er "Nordens kvarter". Kring allan tann vakra og hugnaliga býlingin eru vøkur og gomul træhús. Nógv av træhúsunum minna satt at siga um stór dukkuhús. Tá ein gongur runt í "Nordens kvarter", fær ein kensluna av at verða farin aftur til 19. øld. Upprunaliga var talan um ein arbeiðarabýling, men nú er "Nordens kvarter" ein býlingur fyri tey betru stillaðu í býnum. Hvørt ein ynskir náttúruupplivingar á sjónum ella á landi, so fáast hesar í Bergen og kring Bergen. Stutt er norður til Sognefjorden, har náttúran er veruliga stórbær. Til ber eisini at fara ein siglitúr, har ein siglir framvið oyggjum, hólmum og flúrum. Til ber eisini at fara skipaðar fjalltúrar. Velur ein heldur at verða verandi í Bergen, so er býurin væl fyri, tá tað kemur til handilslív og mentanarlív. Konserthøllin "Grieghallen", sum er nevnd eftir býarsoninum, Edvard Grieg er ein sonn listafrøðilig perla. Óannsæð hvat miðað verður eftir, so er ein bert ein fimm korters drúgvan flúgvitúr úr Vágum til allar tær stóru upplivingarnar í Bergen.